Álit

í

løgtingsmáli nr. 92/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) (Hækkan av útgjaldshámarkinum, barsilspeningur til nýútbúgvin o.a.)

Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 11. apríl 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 19. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.

Ein samd nevnd viðmerkir, at tað er gott, at hámarksupphæddin hækkar úr 25.000 kr. upp í 30.000 kr. Hámarksupphæddin hevur staðið í stað í mong ár og hevur ikki fylgt við øðrum vøkstri í samfelagnum.

Fyrsta tíðin við barninum hevur stóran týdning, og tí er tað gott, at vit hava eina góða barsilsskipan, har foreldur kunnu vera heima við nýfødda barninum og hóast tað varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Frameftir verður lestrarstuðulin eisini taldur við í útrokningargrundarlagnum fyri útgjald úr barsilsskipanini. Nýútbúgvin foreldur, ið møguliga ikki hava verið so nógv á arbeiðsmarknaðinum undir lestrinum, verða betur stillað, tí at úrokningargrundarlagið nú verður tað hægri.

Rættarnevndin heldur broytingarnar í hesum uppskotinum vera góðar. Undir viðgerðini er eisini upplýst, at ætlanin er at gera fleiri broytingar í barsilsskipanini við tí endamáli at gera skipanina smidligari.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 30. apríl 2024

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur